Í vikuskiftinum spæla
**FRIENDS**

Nýggjársaftan 31. desember spæla
**FRIENDS**

Nýggjársdag 1. januar spæla
**FRIENDS**

Leygarkvøldið 29. desember kl. 19.00
**NÝGGJÁRSBINGO**

Opið er:
Mán. - Hós. 19.00 - 24.00
Frí. - Leyg. 17.00 - 04.00
Sunnudag 17.00 - 24.00

Tórshøll

Felagið Tórshøll Sverrisgøta 22 FO-100 Tórshavn Tlf. 311565

# All That Rain gevst at spæla



**All That Rain hevur valt at gevast eftir átta sera aktiv ár**

TÓNLEIKUR

- Vit halda, at tað er upp á sítt pláss at vit gevast nú. Vit hava havt nógvar útskiftingar, og um vit skulu halda fram, so mugu enn fleiri útskiftingar til. Tískil hava vit valt at gevast við All That Rain, sigur bólkurin í tíðindaskrivi.

Bólkurin gav fløguna The Naked Truth út í 2001, og er hetta einasta fløgan, ið kom frá bólkinum. Manningin tá var Jens Marni Hansen (sang/gittar), Jens Tummas Næss (bass) og Henning Nicodemussen (trummur)

Manningin 2007 er Rókur Jákupsson Jakobsen (sang/gittar), Jens Tummas Næss (bass), Johan Ziskason (gittar) og Henning Nicodemussen (trummur).

Bólkurin endar hetta tíðarskeiðið við at spæla tey støðini, ið teir hava havt bestu lurtaraskararnar.

Suðuroy (Hvalba) fríggjakvøldið 28. des 2007.

Tórshavn (Rex) fríggjakvøldið 4. jan 2008.

Seinasti møguleiki at hoyra All That Rain verður 5. januar 2008 í REX.




## SKIPARAR OG MASKINSTJÓRAR TIL NÝBYGNINGAR HJÁ P/F SUPPLY SERVICE

P/F Supply Service byggir í løtuni tríggjar nýbygningar av slagnum PSV og søkir við hesum eftir skiparum og maskinstjórum til skipini.

Starvsøkið
Umframt at røkja vanliga arbeiðið og ábyrgdarøkini sum maskinstjórar og skiparar, koma tey, sum sett verða í starv, at vera við í byggieftirlitinum av viðkomandi skipi og fáa somuleiðis ábyrgd av skjølum í sambandi við ISM og ISPS.

Førleikar
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarar hava hollar royndir á sínum øki, sýna góðan røkjuskap og hava góð samstarvsevni. Fyri skiparar er tað fyrimunur at hava DPII sertifikat, og fyri maskinstjórar er tað fyrimunur at hava royndir við diesel-elektriskari framdrift.

Vit bjóða
- Nýmótans skip við sjónvarpi og interneti á hvørjum kamari
- Venjingarrúm og gott arbeiðsumhvørvi
- Løn sambært galdandi sáttmála

Umsóknir og tíðarfreist
Umsóknir við avritum av prógvum og skeiðum og upplýsingum um royndir skulu sendast til P/F Supply Service, Kulibakki, FO-520 Leirvík og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. februar 2008.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Jens Meinhard Rasmussen, tlf. 28 33 47. Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Um P/F Supply Service
P/F Supply Service er offshoreparturin av Sjóborg samtakinum, ið hevur rikið reiðaravirksemi síðan 1970. Felagið byggir í løtuni tríggjar nýbygningar av slagnum Havyard 832 CD. Skrivstovan hjá P/f Supply Service er í Leirvík og er góðkend við ISO 9001, ISO 140001 og OHSAS 18001.

SENDISTOVAN